VI‹MERKINGAR

Peningurin skal fylgja teimum gomlu

Álvur Kirke
valevni Mi›floksins til b‡rá›svali› í Havn

Hvat skulu vit gera vi› tey gomlu?

Vit hava ellisheim, samb‡li og røktarheim, men samfelagi› nøktar ikki tørvin, - og verri enn so!

Tey eldri ver›a fleiri og fleiri, og ta› ver›ur kanska ikki so leingi til tú og eg eru millum tey eldru ella tey gomlu.

Fyrr var ta› so, at fleiri ættarli› bú›u saman, og hjálptu hvørjum ø›rum. Børnini hjálptu foreldrunum, og foreldrini hjálptu børnunum. Tey yngru hjálptu teimum eldru o.s.f.r.

Men nú ver›ur sagt, at hetta ikki ber til longur. Tey ungu hava oftast d‡r hús, sum skulu gjaldast; og fyri at gjalda húsini, noy›ast bæ›i út at arbei›a. Børnini ver›a koyrd í vøggustovu og í barnagar›.

Hava tey yngru foreldur, sum ikki kára seg sjálv, ver›a foreldrini koyrd á ellisheim ella á onkran annan stovn. Tey yngru hava ikki rá› at ganga heima og passa foreldur ella verforeldur.

Samfelagi› er vori› miskunnarleyst og kærleiksleyst, - eisini á hesum øki.

Tey gomlu vilja oftast vera heima, so leingi sum møguligt. Men hetta ber snøgt sagt ikki til peningaliga, hjá mongum familjum.

Eitt stovnspláss til eitt eldri fólk kostar nógvan pening, og bí›ití›in long. Ney›ugt er, at bi›ja um pláss fleir ár frammanundan.

Um nú peningurin fylgdi teimum gomlu, t.v.s., at yngra ættarli›i› fekk tann pening, sum stovnurin fær, fyri at passa tey eldru, so bar helst væl til fíggjarliga, at veri› heima og passa eldra ættarli›i›. Tá hev›i yngra ættarli›i› ein valmøguleika, sum tey ikki hava í dag.

Hetta vildi stytt bí›ilistarnar munandi, tí ta› høvdu veri› fleiri, sum valdu at fara heim at passa tey eldru, - um ta› var fíggjarliga møguligt.

Kærleikin til foreldur er ikki burtur! Men ta› er samfelagsskipanin, sum noy›ir yngra ættarli›i› at koyra tey eldru á stovn.

Mi›flokkurin vil virka fyri at skapa eitt samfelag, har yngra ættarli›i fær fíggjarligar møguleikar at vísa teimum eldru kærleika og umsorgan.

Heldur tú, at hetta er eitt gott hugskot, so eigur tú at velja Mi›flokkin, lista H.

Barnaskúlar í nærumhvørvinum

Bent J. Hansen
Valevni á lista B

Havi í tveimum greinum l‡st, hvussu sparast kann á íløgusí›uni vi› at samarbei›a vi› privatar arbei›stakarar um uppgávur. Hetta er sjálvsagt fyri at kommunan kann fáa rá› til íløgur a›rasta›ni. Havandi í huga, at allir skúlarnir eru á tremur og at fleiri enn teir avtala›u 24 næmingarnir eru í hvørjum flokki, má sannast, at her má okkurt munagott gerast, og hetta er ikki bílig íløga, i› skal til. Útbyggjast má vi› teir skúlar, har hetta er gjørligt, t.d. Argja skúla og Hoyvíkar skúla. Afturat hesum má ætlanin um ein nærskúla ovast á Løgmansbreyt »í sambandi vi› n‡ggja b‡lingin har«, og ein nærskúla í vesturb‡num, sum hevur veri› til umrø›u, fremjast í komandi b‡rá›ssetu. Ta› má vera ein borgararættur, at børn okkara kunnu ganga í barnaskúla í nærumhvørvinum. Hetta vilja vit í Sambandsflokkinum arbei›a fyri, um vit fáa tann ney›uga stu›ulin frá veljarunum.

Minnist til at bert vi› samstarvi millum privat fyritakssemi og kommununa kunnu vit loysa tær stóru uppgávur, i› eru so átrokandi at fremja, men sum íløgukarmur landsst‡risins for›ar okkara kommunu í at gjøgnumføra hóast hon hevur mátt til tess.

Charlotta á Váli Olsen

Charlotta á Váli Olsen,
pedagogur, valevni Mi›flokksins til Tórshavnar B‡rá›

– hvør er hon og hvørjum stendur hon fyri?

Av tí at eg ongantí› á›ur hava veri› á lista til b‡rá›svali› í Havn, eru ta› helst fleiri, sum spyrja hvør eg og hvat eg standi fyri.

Fødd í 1954

Foreldur: Anna og Líggjas á Váli. Mamma er ætta› úr Havn, men er uppvaksin í Nor›radali

Pápi vaks upp úti í Svínoy, bú›i og arbeiddi í Klaksvík í mong ár

Átjan ára gomul flutti eg til Havnar saman vi› foreldrunum í 1972

Útbúgvin sum pedagogur í Danmark í 1978 og arbei›i sum lei›ari á vøggustovu Stella Maris

Arbeiddi sum pedagogur á Barnaheiminum 1978-81

Gift vi› Óla Hans Olsen úr Skálavík

Børn: Jona 8 ár og Ólavur 6 ár

Eg vaks upp í einum gó›um og gudsóttandi heimi, har kærleikin og vir›ing fyri ø›rum menniskjum var í hásæti. Umsorgan fyri ø›rum, var eitt ey›kenni fyri barnaheim mítt.

Førningurin heimanifrá hevur ført vi› sær, at eg altí› havi kent eina trongd at hjálpa teim veiku og forfjóna›u. Hjálpa teimum, i› fingu skerdan lut í lívinum, ikki minst teim breka›u, børnunum, ungu, teimum í mi›jum árum og teim eldru, i› hava serligan tørv. Hesum menniskjum ætli eg mær at virka fyri um eg gerist b‡rá›slimur. Hetta er í stuttum ta›, i› eg standi fyri.

Men skal hetta eydnast havi eg brúk fyri tínari hjálp og atkvø›u.

Kommunuvali› á Tvøroyri

Leivur Nygaard
Valevni á Samgongulistanum á Tvøroyri

Undirrita›i nam seinast vi› nøkur mál, sum mugu takast upp í eini komandi b‡rá›i. Her eru nøkur afturat.

Ungdómstrupulleikar
Tey ungu, sum ikki dyrka› ítrótt, hava har›liga brúk fyri einum tilhaldssta›i um kvøldarnar. Sum nú er, rekast tey húsvill í b‡num og havast vi› ting, sum ongasta›ni hoyra heima. Hesin trupulleiki má takast í størsta álvara. Vit kunna ikki bert standa á sí›ulinjuni yppandi øks og hyggja at, me›an ungdómur okkara fellur longur og longur út í ólevna›. Tá skipa› ungdómsarbei›i so at siga er burturdotti›, má stu›last má undir at fáa endurskipa til dømis skótarørslurnar og ungdómsklubbar. Fyribyrgjandi og bøtandi arbei›i má gerast, fyri at fáa vilsta partin av ungdóminum á rætta kós.

Meira virksemi
Arbei›ast má fram ímóti, at vit fáa størri virksemi til oynna. Hetta gerst best vi›, at øllin oyggin stendur saman sum ein ma›ur, og setur krøv til landsumsitingina um at fáa meira alment virksemi til. Oljuvinnan er ein avgjørdur møguleiki sum arbei›ast má vi›. Men her sær út til, at sterkar kreftir í mi›sta›arøkinum, saman vi› ávísum politikarum, ikki vilja hoyra um Su›uroynna í hesum samanhangi. Hesum skulla vit ikki lata okkum lynda, men krevja rætt okkara sum javnstø›is borgarar í sama landi.

Mi›b‡urin
Nógv hevur veri› tosa› um hendan blett. Nógv arbei›i, og nógvur peningur er lagdur her, men misjavnt er, hvat fólk flest halda um endaliga úrsliti›. Tey flestu tykjast ónøgd. Ta› er væl skilligt. Helst er ein bensinstø› komin at standa, har hon nokk ikki skuldi sta›i, kanska eru ognarvi›urskiftini heldur ógrei›, nógvur peningur er lagdur í arbei›i›, sum kanska ikki skuldi veri› gjørt so ”skjótt” li›ugt, men dríggja› yvir eitt longri tí›arskei›. Her eru ting gjørd, sum áttu at ver›a gjørd á annan hátt, men samanumtiki› má sigast, at hóast bur›artí›in var long og strævin, er barni› er vakurt. Nú mugu vit bert ansa eftir, at ta› veksur seg uppaftur vakrari.

Ítrótturin
Ítróttarfeløgini á plássinum hava ta› sum heild gott, men ynskiligt var, at ungdómurin gjørdi meira brúk av teimum tilbo›um sum nú einafer› eru. Tó er fótbóltsvøllurin á Sevm‡ri í sera ringum standi, og ver›ur nokk kolldømdur innan alt ov langa tí›. Nú mugu vit gevast at pjøssa uppá henda gamla vøll, hvat hevur ta› ikki kosta› gjøgnum árini, og, saman vi› TB, gera ein heilt n‡ggjan. Heilt upplagt er at gera eitt stadionøki í ni›urlagda grótbrotinum undir Akurger›i. Hetta kostar nógv, men ikki er ney›ugt at gera alt li›ugt eftir einum ári.

Nógv anna› kundi veri› at trivi› í, men ov drúgt ver›ur at vi›gera alt ein hevur upp á hjarta her. Ikki ver›ur lova› naka› sum helst — bert ta›, um eg veri› valdur, at leggja alla orku í at gera eitt rættvíst, og fyri borgararnar, forsvarligt b‡rá›sarbei›i.

Vinnulívi› í Tórshavnar Kommunu

Uni Danielsen
Valevni Fólkafloksins til Havnar b‡rá›

Nú oljuvinnan stendur fyri durum, hava vit lyndi til at seta alla orku inn á hesa vinnu, men ta› er av stórum t‡dningi, at vit ikki gloyma ver›andi vinnulív í kommununi.

Ta› er eitt gott og sunt vinnulív, sum er vi› til at skapa inntøkugrundarlagi› hjá kommununum og landinum. Vit vilja bera so í bandi› at umstø›urnar hjá vinnulívinum á sjógvi og landi gerast so gó›ar sum tilber. Tórshavnar Kommuna hevur eitt gott vinnulív, handilslív og tænastuvinnu. Ta› skulu skapast gó›ir karmar til allar hesar vinnur. Vit hava ofta lyndi til at tosa meiri um eina møguliga oljuvinnu. Í løtuni er meir umrá›andi at vit fyrst og fremst skapa gó› livilíkindi til verandi vinnur og tænastur.

M.a. hoyrdu vit herfyri, at næststørsta útflutningsvinnan í Føroyum, sjógvalingin, vantandi fór at vaksa til uml. 100.000 tons innan nøkur fá ár. Henda vinna er sera stór í Tórshavnar Kommunu, vi› alibrúkum á Gulanum, í Kaldbaksfir›i og í Kollafir›i, smoltstø› í Nor›adali.

Kommunan skal framhaldandi, í samrá› vi› vinnuna, skapa karmar so vøksturin innan vinnuna eisini liggur eftir her í kommununi.

Vit á lista A vita, at ta› er vinnulívi› sum skapar frambur›in.

VIÐMERKINGAR

Betri skúlaumstøður treyt fyri menning av býnum



Høgni Djurhuus
Valevni Sambandsfloksins í Havn

Skúlarnir í Havnini eru vorðnir ov trongir, bæði viðvíkjandi hølum og viðvíkjandi undirvísing. Flestu skúlarnir eru fullsettir við børnum, so at tað ikki altíð er møguligt hjá teimum smáu børnunum at ganga í skúla í nærumhvørvinum. Tey mugu ofta ganga fram við skúlanum, sum er í grannalgnum fyri at koma til ein skúla, sum liggur longri burtur. Skúlavegurin verður longri og ótryggari, og børnini sum tey spæla við verða ikki tey somu, sum tey ganga í skúla saman við.

Børnini í frammhaldsdeildini hava trupuleikan av teimum trongu karmunum, tí undirvísingartilboðini eru ov fá, tá ið tey skulu velja breytir. Tað eru nú fýra skúlar, sum hava framhaldsdeildir við 2-3 paralelflokkum og valmøguleikarnir eru tilsvarandi fáir. Betri var um hesir vóru samlaðir í ein skúla, so at man har kundi givið fleiri og fjølbrotttari valmøguleikar. So hevði tað ikki verðið neyðugt hjá so nógvum, sum nú, at fari á eftirskúla í Danmark. Ì løtuni er eisini ein missmunur ímillum børnini. Tey sum skulu úr skúlunum í Hoyvík, Kollafirði og Nonnuskúlanum kunu sjálvi velja hvørja framhaldsdeild tey vilja í, meðan børnini úr hinum skúlunum einki val hava. Betri hevði verðið at havt ein stóran felags framhaldsskúla við nógvum og fjølbroytum lærugreinum.

Tær skúlastovur, sum gerast fríar við hesum, skulu nýtast til tey smáu børnini, so at tey sleppa at ganga í skúla í nærumhvørvinum. Tey fáa ein stytri og tryggari skúlaveg. Um tað ikki ber til, mugu smærri skúlar byggjast til tríggjar teir yngstu flokkarnar, har tørvur er fyri teimum.

Tórshavnar Komuna eigur eisini at stuðla arbeiðnum við at umbyggja og nýbyggja skúlar, sum hoyra til landsumsitingina, tekniska skúlan, studenta skúlan og handilskúlan. Alt útbúgvingar, sum viðvíkjandi byggningum eru forsømdar og sum eru sera neyðugar, tá oljuvinnan tekur seg upp her hjá okkum.

Tórshavn 8. november 2000.

Arbeiði og trivnaður á Tvøroyri

Dan Erik Johansen
Valevni á javnaðarlistanum

Hvat skal til fyri at fáa fólk at trívast í sunnara parti av Føroyum.

Tvøroyri er eitt av teimum plássunum í landinum, sum hevur mist eina mest fólk í kreppuárunum.

Frá 1987 til 1997 fluttu heili 347 fólk, har av størsti parturin ungfólk. Hetta hevur sett sínu djúpu sár í okra gerandisdag báði á tí vinnuliga og ikki minst á ítróttarliga økinum.

Gongdin er vend, men enn er langt eftir á mál, til at verða uml. 2200 fólk, sum tá okur vóru flest.

Og hetta at fáa fólkið aftur, síggi eg sum eina stóra uppgávu, báði hjá okum kommunalpolitikkarum og ikki minst hjá okra landspolitikkarum.

**Okur eiga at skapa arbeiðspláss, so at okra ungdómur, ið fer av plássinum at fáa sær hægri lesnað, kann koma aftur, og ikki endar í Havnini, soleiðis sum støðan er nú. Okur eiga at fylgja ungdóminum og bjóða teimum vælkomnum aftur á plássið við at vísa á teir møguleikar, ið her eru.*

**Okur eiga at betra um karmarnir á núverandi arbeiðsplássum og skúlum. Soleiðis, at tað ikki verður farið aðrastaðni, tí har eru betri viðurskifti, enn okur kunnu bjóða her á staðnum,og her er skatturin ein høvuðstrupulleiki.*

**Okur eiga at virka fyri, at tað verður liviligari báði hjá eldri sum yngri, við at byggja eldrabýlir til tey eldru, og tryggja grundøkir til tey yngru.*

Alt hetta er treytað av, at okur sleppa av við skuldina hjá kommununi. Núsitandi býráð hevur tikið av einum tilboði, soleiðis at skuldin eftir 4 árum kemur niður á 2 álíkningar. Men tað krevur at okur er sinnað at taka 4 tung ár afturat.

Saman við menning av inntøkugrundarlagnum, við oljuvinnu o.ø., ger henda loysnin, at framtíðin er frægari at lýta at enn í seinastuni.

Men fortretin fyri einum veruligum framburði er, at okur fáa møguleikan at seta okra ætlanir í verk

Gott val.

Íbúðarpolitikkur

Hildur Eyðunsdóttir
Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum

Havnin hevur í dag í stóran mun somu eyðkennir sum aðrir stórbýir. Fyri at nøkta bústaðartørvin hjá borgarunum krevur tað at kommunan hevur ein íbúðarpolitikk.

Íbúðarviðurskiftini eru út av lagi vánalig og tað hava tey verið leingi. Í dag hevur man nærum onki alternativ at velja ímillum enn antin at leiga á tí ótrygga privatmarknaðinum, har prísirnir sjálvandi vera settir eftir útboði og eftirspurningi, ella at keypa/byggja egin hús.

Bústaðartørvurin broytist gjøgnum lívið og tað er stórur munur á bæði tørvi og fíggjarorku hjá t.d. einum ungum lesandi, tí ungu smábarnafamiljuni, tí væletableraðu familjuni, tí einligu mammuni og so hjá einum eldri fólki.

Harafturat er familjuhugtakið broytt, soðleiðis at tað í dag ikki er óvanligt at ein familja er ein mamma og børn hennara. Hon hevur ongan verðsins kjans at keypa sær eini hús í dag, bert við einari inntøku.

Eg meini tí at býráðið eigur at orða ein **heildarpolitikk á íbúðarøkinum,** har atlit verða tikin til at nøkta tørvin hjá ungum sum eldri.

Samfelagið er broytt, men politikkurin hevur ikki lagað seg til broyttu umstøðurnar.

Øll árini hevur býráðið í stóran mun verið mannað av valetableraðum monnum, sum kanska ikki veruliga hava sæð tørvin á fleiri økjum. Fyri at hetta skal broytast er **neyðugt at umboðanin í býráðnum verður breiðari m.a. við fleiri kvinnum.**

Hjááááalp – Janni fer

Okkara kæri AD'ari fer heim aftur til Danmarkar. Vit mugu fluks hava ein nýggjan. Eitt fjall av uppgávum bíðar eftir einum kreativum høvdið.

Vit arbeiða fyri tað mesta á Mac.

Ring 31 42 91 ella send eitt e-bræv til: ingvorn@stephanssonshus.fo

stephanssons hús
Kongabrúgvin · FO-100 Tórshavn · tel. +298 31 42 91 · fax +298 31 64 54
www.stephanssonshus.fo